# Sambýlini tyngja játtanina til heimarøktina alt ov illa



*Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya*

**Sambýlini eiga at fáa eina játtan fyri seg sjálvan, tí sum er, drena tey heimarøktina fyri pening, sigur forkvinnan í Heilsuhjálparafelag Føroya**

HEIMARØKTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Politikararnir mugu hyggja at heimarøktini við øðrum eygum, enn teir hava gjørt.

Tað heldur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya.

Hon hevur ongar viðmerkingar til tað, sum hevur verið sagt og skrivað ímillum Lansstýrismannin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu og økisleiðararnar fyri heimahjálpina um teirra fíggjarliga førleika at stýra játtanini til heimarøktina.

Men hon sigur, at tað er ein veruleiki, at hóast játtanin til heimarøktina veksur, verður minni og minni av pengum til tey, sum hava brúk fyri heimarøkt av ymsum slagi.

### Sambýlini fyri seg

Hon heldur, at ein orsøk er, at tað eru komin so nógv sambýli ymsastaðni í landinum hesi seinastu árini.

– Útreiðslurnar til sambýlini verða tiknar av játtanini hjá heimarøktini.

Júst tað heldur Ása Olsen er ein trupulleiki.

– Sambýlini eru dýr at reka, tí tey eru mannað við fólki alt samdøgurið.

Hon sigur, at tí er støðan tann, at sambýlini drena heimarøktina fyri pengar og tað heldur hon, er ein orsøk til, at heimarøktin altíð er við skerdan lut.

– Í Sambýlum hava fólk røkt 24 tímar um samdøgurið. Høvdu somu fólkini verið heima, høvdu tey fingið røkt nakrar fáar tímar. Tì eru sambýlini ómetaliga tyngjandi fyri játtanina hjá heimarøktini, og tí koma hesi áhaldandi krøvini um sparingar, sigur forkvinnan í heilsuhjálparafelagnum.

– Har, sum sambýlini eru, er tað ómetaliga truput at fáa endarnar hjá heimarøktini at hanga saman.

Tí heldur hon avgjørt, at hesi bæði økini áttu at verið skild sundur, so at sambýlini høvdu eina serskilda játtan á fíggjarlógini.

Avleiðingin av støðuni, sum er nú, er, at tey, sum liggja á sambýlunum, verða væl og virðiliga røkt, men tey, sum eru heima, fáa alt og vánaliga røkt.

Hon heldur ikki, at politikararnir hava gjørt sær greitt, hvat sambýlini bera í sær.

– Sambýli verða bygt og so halda politikarar, at tey skulu røkja somu skyldur sum røktarheimini. Men neyðug játtan fylgir ikki við, leggur hon afturat.

### Rætt at seta eitt mark

Men, hvat sigur tú so til, at heimarøktin boðar frá, at tey ikki eru før fyri at taka fleiri fólk í heimarøkt fyribils?

– Er tað so, at sjúkrahúsini spara við at skrivað fólk út, "upp á nakkan " á heimarøktini, fyrrenn enn tey annars skuldu at verðið, uttan at heimarøktin fær meiri pening at arbeiða við, er púra rætt at tala at og at gera vart við seg við ikki at taka fleiri brúkarar í heimarøkt.

– Tá ið eitt røktarheim er fult, so er tað fult og tekur ikki fleiri fólk inn. Heimarøktin kann heldur ikki strekkja seg í ta óendaliga og tí haldi, eg, at tað er rætt at seta eitt mark og nokta at taka fleiri fólk í skipanina, fyrrenn játtanin hækkar.

– Tað kann ikki verða rætt, at sjúkrahúsini sleppa at spara við at leggja eyka byrðar á heimarøktina, uttan at heimarøktin fær tilsvarandi játtan.

Hon vísir á, at tað er eisini ein spurningur um at geva teimum fólkunum, sum eru í skipanina, eina forsvarliga tænastu. Skal heimarøktin blíva við at taka fólk í skipanina, kann tað enda við, at røktin verður so smábýtt, at ongin fær eina forsvarliga røkt.

Sosialurin hevur eisini fingið upplýsingar, sum benda á, at júst hetta er støðan, tí tað kemur meiri enn so fyri, at sjúkrahús útskriva sjúklingar " til maksimala heimarøkt", sum sjúkrahúsið sigur.

Men slík boð tekur Heimarøktin als ikki til eftirtektar. Tað er altíð Heimarøktin sjálv, sum ger eina fakoiga meting og sostatt ger av, hvussu nógv røkt, hvør einstakur fær.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri samkenslu og hjálp, tá kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Esther Olsen,**
**Tvøroyri**

andaðist og varð jarðaður.

Eingin nevndur og eingin gloymdur, men tó ein serstøk tøkk til tykkum, ið vóru um hana, hjálptu henni og veittu henni linna.

*Familjunnar vegna*

**Finnløgg og John**


Fastir Sissal, Nikolina Johannessen:

# – Vit eru øll bangin um Sissal

**-Eg eri serliga bangin um, hvussu sjónvarpið fer at framstilla Sissal, og hvussu fólk fara at uppfata hana eftir kappingina, men tað hava vit tosað nógv um, og Sissal er fullgreið yvir avleiðingarnar, ein slík kapping kann hava við sær, sigur Nikolina Johannessen, ið er fastur føroyska Big Brother luttakaran**

FØROYINGUR Í BIG BROTHER
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

-Vit er øll bangin um Sissal, sigur fastirin, Nikolina Johannesen, sum hevur tætt samband við føroyska Big Brother luttakaran. Fyriskiparanir av realitysendingini hava boðað frá, at Big Brother-sendingarnar í ár vera villari og eirindaleysari enn nakrantíð. Herrópið í ár er "Ingen grænser – ingen hensyn", so lítið er at ivast í, at tey avvarðandi hjá luttakarunum sita spent og fylgja við, hvat fer at henda í Big Brother-húsinum í ár.

Nikolina sigur, at serliga óttast ein avleiðingar av tí, ið møguliga fer at fara fram í húsinum, tí luttakararnir hava eitt lív eftir Big Brother. Eins og Sissal býr Nikolina eisini í Danmark, og tær hava tosað nógv saman dagararnir undan at Big Brother byrjaði .

- Eg eri serliga bangin um, hvussu sjónvarpið fer at framstilla Sissal, og hvussu fólk fara at uppfata hana eftir kappingina, men tað hava vit tosað nógv um, og Sissal er fullgreið yvir avleiðingarnar, ein slík kapping kann hava við sær, sigur fastirin.

### Ikki bangin fyri nøkrum

Fastirin og tey avvarðandi lýsa Sissal, sum eina frísk gentu, ið aldrin er bangin fyri nýggjum avbjóðingum. Hon er uttantil, og hevur lætt við at fáa samband við fólk. Sissal er rættiliga virkin, og hevur verið við í nógvum. Hon hevur verið í ólavsøkukabarett, staðið fyri mótasýningum og verið sminkari í bæði filmum og mótasýningum.

– Eg vil lýsa hana sum eitt energibunt, ið er ótrúliga kreativ, skilagóð, og ikki minst ein fitt genta, sigur ein avvarðandi

### Vóni føroyingar stuðla henni

Fastirin sigur, at hon er ómetaliga errin av Sissal, at hon er komin so langt, og hon vónar, at allir føroyingar fara at stuðla Sissal í Big Brother kappingini. Sjálv ætlar hon sær at sita spent frammanfyri skíggjanum hvørt kvøld, tá sendingar verða vístar.

Spurd um hvussu langt, hon væntar, Sissal fer at koma í kappingini, svarar Nikolina, at sjálvsagt fer hon allan vegin, og vinnur kappingina. Kemur hon so langt, skal hon verða í Big Brother húsinum í samfullar 67 dagar, og eydnast tað henni, so verður hon næsti føroyski millióningurin.

## Mótmæla skerjingum

**Javnaðarflokkurin vil hava, at játtanin til heimarøktina verður hækkað**

HEIMARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin mótmælir harðliga tað viðferð brúkararnir av heimarøktini fáa frá landsstýrinum.

Tað sigur flokkurin í eini yvirlýsing, sum er gjørd nú um vikuskiftið.

Flokkurin sigur, at fyri fyrstu ferð, síðani skipanin varð stovnsett í sjeytiárunum, má bíðast eftir at fáa bráneyðuga heimarøkt.

– Vit krevja av landsstýrinum, at neyðug játtan verður veitt heimarøktini soleiðis at hon aftur kann verða ein trygg, álítandi skipan fyri tey, ið hava tørv á henni, sigur flokkurin

Somuleiðis átalar hann harðliga, at játtanir tilvildarliga verða skornar á serstovnaøkinum.

Javnaðarflokkurin fer í komandi fíggjarlógarviðgerð at arbeiða fyri at játtaninar til heimarøktina og serstovnaøkið verða øktar samsvarandi tí vaksandi tørvinum, sigur hann í yvirlýsingini.



# Sissal við í Big Brother



*Sissal Olafsdóttir Frisdahl er fyrsti føroyski luttakarin nakrantíð í einari Big Brother kapping. Saman við fleiri túsund øðrum sendi hon umsókn fyri góðum trimum mánaðum síðan, og hon hevur nú vunnið seg fram til at verða millum teir 12 seinastu luttakararnar í Big Brother í ár.*
*Mynd: www.bigbrother.dk*

**Sissal Olafsdóttir Frisdahl er fyrsti føroyski luttakarin nakrantíð í einari Big Brother kapping. Saman við fleiri túsund øðrum sendi hon umsókn fyri góðum trimum mánaðum síðan, og hon hevur nú vunnið seg fram til at verða millum teir 12 seinastu luttakararnar í Big Brother í ár**

FØROYINGUR Í BIG BROTHER
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað mundu vera nógvir føroyingar, ið sótu framman fyri sjónvarpsskíggjan sunnukvøldið, tá Big Brother á sjónvarpsrásini, TV Danmark, aftur fór av bakkastokki. Heilt óvæntað er ein føroyingur millum luttakararnar í Big Brother í ár. Sissal Ólafsdóttir Frisdahl úr Havn, men búsitandi í Keypmannahavn, hevur vunnið seg fram millum tólv tey seinastu í kappingini í ár. Hon er dóttir Inu Frisdahl og Olaf Johannessen, ið bæði eru búsitandi í Danmark.

Lutakararnir í Big Brother er í kappast um ein millión krónur. Sendingin er fyriskipað í einum húsi, har luttakararnir verða filmaðir alt døgnið. Big Brother er eitt sokallað realityshow, har møguleiki er hjá hyggjarum at fylgja gjølla við, hvat luttakararnir fáast við inni í húsinum. Alt frá, hvat tey eta um morgunin til at síggja luttakararnar naknar í brúsini er rúm fyri í Big Brother-sendingunum

Nógv rok hevur verið um sendingar seinastu árini, tí luttakararnir hava ikki smæst burtur við at bera seg at á ein hátt, ið vanlig fólk ikki høvdu hættað sær frammanfyri sjónvarpsskíggjanum, har eitt ótal av hyggjarum fylgja spent við.

### Til stuttleikar

Avvarðandi hjá Sissal siga, at hon meldaði til Big Brother til stuttleikar, og hon hevði als ikki væntað at vinna seg fram millum tey, ið at enda skuldu í Big Brother húsið. Fyri góðum trimum mánaðum síðan sendi hon umsókn, og síðan hevur hon verið ígjøgnum eitt ótal av kanningum, til hon endiliga slapp inn í Big Brother-húsið sunnukvøldið.

Tey avvarðandi greiða frá, at Sissal og hinir luttakararnir hava verið ígjøgnum drúgva heilsukanning og prát við sálarfrøðingar, áðrenn tey sluppu í Big Brother-húsið. Hvørja viku frammyvir verða luttakarar sáldaðir frá, og vinnarin verður í húsinum í 67 dagar í alt.

Sunnudagin varð fyrsta sendingin send. Stutt innsløg vórðu gjørd um hvønn av teimum 12 luttakararunum. Innslagið við føroysku Sissal var ógvuliga vakurt. Innslagið varð tikið upp í Føroyum næstseinasta vikuskifti. Hon var við Norðlýsinum á Nólsoyarfirði, í Kirkjubø og Cafe Natúr, har Sissal greiddi stutt frá sær sjálvari, og hvørjum hon stendur fyri

Tey avvarðandi siga, at eingin mátti vita, hvørji ørindi, Sissal hevði í Føroyum undir upptøkuni, tí fingu fólk frænir av, at hon skuldi vera við í Big Brother, varð hon koyrd úr kappingini alt fyri eitt.

### Trygdin í hásæti

Luttakararnir fáa einki at vita, hvat fyrifert uttanfyri húsið, og hava einki samband útheimin. Kortini hava tey avvarðandi av luttakararunum í Big Brother-húsinum fingið ta trygd, at um okkurt álvarsamt er áfatt, so fáa tey alt fyri eitt samband við luttakararnar.

Í húsinum er ein sokallaður skriftistólur, har luttakararnir sleppa at tosa við tey avvarðandi, um tey ikki kenna seg væl í húsinum ella um annað er áfatt, uttan at sjónvarpstólini eru frá, og tey avvarðandi halda at tað er ein góð trygd at hava. Eftir sendingarnar fáa luttakararnir knýttan ein sálarfrøðing at sær, um neyðugt er fyri tí.

### Sissal longu gjørt seg merktan

Sunnukvøldið fingu teir tólv luttakararnir høvi til at læra hvønn annan betri at kenna. Skipað var fyri einum hugnakvøldi, og sambært heimasíðuni, bigbrother.dk, so hevur føroyska Sissal funnið seg væl til rættis í húsinum, og longu gert seg merktan við einum lítlum flirti við dananum Robert.

**Fakta**

Navn: Sissal Olafsdóttir Frisdahl
Foreldur: Olaf Johannessen og Ina Frisdahl
Fødd: 16. januar 1983
Bústaður: Keypmannahavn
Hædd: 168 cm
Vekt: 56 kilo
Starv: Barvørður
Eygnalitur: Blá

*kelda: bigbrother.dk*


